## Markleys Útbúgving 2005-2006

**Afturvendandi kunningarátakið um lestrarmøguleikar burturi og heima verður aftur 11.og 12 jan 2006**

ÚTBÚGVING
*tíðindaskriv*

Tá fara umboð fyri MFS, Svøríki, Avstalia/NýSæland og Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetrinum at greiða studentum frá lestrarmøguleikum í Føroyum og aðrastaðni. Kunningin verður á teimum trimum stóru miðnámsskúlunum og í Klaksvík.

Fyrrapartin mikudagin 11. jan. 2006 kl. 10.00 verður tiltakið á Handilsskúlanum í Havn, seinnapartin kl. 12.00 í Hoydølum og fyrrapartin hósdagin 12.jan. kl. 10.00 á Kambsdali. Harafturat verður skipað fyri kunningarkvøldi mikukvøldið 12. nov. kl. 19.30 á Tekniska skúla í Klaksvík. Øll tiltøkini vara uml. tveir tímar og eru ókeypis.

Skráin á øllum fýra tiltøkunum verður hendan:

Svøríki: Sussi Thuré, lestrarvegleiðari - sussi@vistas.nu

Avstralia/NýSæland: Palle S. Jensen, EDU-DK psj@edu-danmark.dk

MFS: Doris Bjarkhamer og Sunnuvá Vesturdal- At vera lesandi - mfs@mfs.fo“ mfs@mfs.fo

Føroyamálsdeildin: Jákup Sørensen, kunningarfólk á Fróðskaparsetrinum - www.setur.fo

Spurningar til tey einstøku umboðini.

Fjórða og seinasta umfarið í Markleys útbúgving 2005/2006 verður 9. og 10. mars 2006. Við verða umboð fyri MFS, Frakland, Spania, Náttúruvísindadeildina og Føroya Sparikassa.

Tað eru Mentamálaráðið, Lestrarvegleiðarafelagið, MFS og Altjóða Skrivstovan, sum skipa fyri Markleys Útbúgving 2005/2006.

Holger Arnbjerg á Altjóða Skrivstovuni (www.ask.fo) er samskipari.

Nýtt yrkingasavn:

# Ein rødd hesumegin hinumegin

**Nýggja yrkingasavnið Betwixed eftir Christian Fróða Djurhuus endurspeglar tað umskiftiliga sinnið – ein rødd, ið tosar sak teirra, ið ofta verða bólkað hinumegin “tað normala”**

YRKINGASAVN
*Anna V. Ellingsgaard*
*sosialurin.fo*



*Við yrkingasavninum Betwixed vónar yrkjarin Christian Fróði Djurhuus at bróta niður múrar millum tað sokallaða “normala” og “ónormala”*

Beint fyri jól gav Christian Fróði Djurhuus út sítt fyrsta yrkingasavn Betwixed. Christian Fróði hevur skrivað yrkingar, síðani hann var heilt ungur, og fleiri av teimum hava verið at sæð á prenti í føroysku bløðunum. Yrkingarnar í Betwixed eru eitt úrval av hesum yrkingum, ella brotmyndir úr einum ofta truplum lívi við sálarligari órógv, sum yrkjarin sjálvur nevnir tær.

### Skiftandi rørsla

Savnið er skipað sum ein støðugt skiftandi rørsla millum sinnisliga daprar og ljósar løtur. Hóast máttloysið allatíðina spøkir, tekur tað ongantíð heilt yvir. Sjálvt í myrkastu løtunum hómast altíð ein vón og ein trúgv uppá, at tað fer at bera til at fóta sær aftur. Myndamálið er í flestu førum bíbilskt samantvinnað við myndum úr náttúruni, myrkri og ljósi.

– Uttan mun til, hvussu myrkt alt tykist, er sólin jú altíð at finna onkustaðni. Í so máta kann Betwixed lutvíst síggjast sum ein roynd at mótprógva pástandin hjá Peturi Pólson í savninum Ongin sól er til. Hóast eg í fyrstuni ikki skilti, hvat Petur Pólson meinti, ávirkaði hansara yrkingasavn meg nógv, tá tað kom út og gjørdist íblástur til onkrar av mínum meir døpru yrkingum, sigur Christian Fróði.

Javnvágin millum tað tunga og tað lættara huglagið kemur oftast til sjóndar í skapi av einum afturvendandi “tú”, eini kvinnu, sum onkursvegna altíð ber vónina um ljósið við sær. Samstundis viðgongur Christian Fróði, at fleiri av hesum yrkingum upprunaliga vórðu skrivaðar sum eitt slag av romantiskum ungdómsyrkingum.

Í øðrum førum manifesterar tráanin eftir innaru javnvág seg í eini persónligari trúgv á Gud, sum skapara av øllum. Her er tað serliga myndin “at koma yvirum”, sum trínur fram í longslinum eftir einum lívi uttan órógv.

### Brýtur niður múrar

Betwixed er ein stuðulsútgáva til arbeiðið hjá Sinnisbata, sum yrkjarin sjálvur havi fingið nógva hjálp frá.

– Kanska yrkingarnar eisini kunnu verða ein rødd hjá teimum sinnisveiku, tí eg kenni jú teirra støðu innanífrá, sigur Christian Fróði og leggur afturat, at vónandi kann savnið verða við til at bróta niður múrar millum tað, vit vanliga fata sum “normalt” og “ónormalt.

Tað vil so verða, at fyri tey sokallaðu “normalu” kunnu sinnisveikleikar oftast tykjast sum nakað gátuført – okkurt, sum liggur hinumegin tað, vit megna at skilja. Í yrkingunum vísir yrkjarin, at tað sum er hinumegin ikki er so gátuført kortini og oftast nakað, tey flestu kenna til í onkran mun.

Samanumtikið kunnu yrkingarnar í Betwixed kanska best lýsast sum blandaðar kenslur, sigur yrkjarin og nevnir í sama viðfangi, at hetta eru yrkingar, hann bara mátti geva út.

– Tað kendist næstan sum, at eg gekk við verkjum og bara mátti fáa hesar yrkingarnar út. Hetta er so ein byrjan, men dreymurin er at geva eitt meir heilskapað og gjøgnumarbeitt savn út, tá eg kenni meg til reiðar til tað, sigur Christian Fróði Djurhuus.

# Fjølmiðlar á skránni á Áarstovu

**Leygarkvøldið 28. januar skipar MFS fyri áhugaverdum fyrilestri um fjølmiðlar**

ÁRHUS

Tað eru tær báðar, Tórunn Ellingsgaard og Beinta L. Jacobsen, sum í felag fara at halda fyrilestur um teirra arbeiðsroyndir innan føroyskar og danskar fjølmiðlar, og síðan eina samanbering av føroyska og danska fjølmiðlaheimin, bæði tá tað ræður um arbeiðsumstødur, men eisini góðsku av tí, ið er í fjølmiðlunum.

Tórunn Ellingsgaard hevur m. a. arbeitt í SVF, MTV og seinast á DR. Hon er útbúgvin journalistur og hevur m. a. givið út eina bók um Peter Brixtofte.

Beinta Løwe Jacobsen hevur m. a. arbeitt í ÚF og hevur skrivað fyri føroysku tíðindabløðini. Hon er eisini útbúgvin journalistur og lesur nú stjórnmálafrøði á Århus Universitet.



